VIÐMERKINGAR

# Skal avgjaldið á motorsúkklum lækkast?

Jón Kragesteen



Viðmerking í sambandi við at tingmaður hevur lagt fram uppskot um at lækka avgjaldið á motorsúkklum
Jón Kragesteen hevur hesa viðmerkingina:

Hin 13. apríl í ár var aðalorðaskifti í løgtinginum um Nullhugsjónina. Undan hesum degi var nógv gjørt burtur úr at fáa evnið fram í sjónvarpi, útvarpi, bløðum, umframt at faldari var sendur í hvørt hús. Orðaskiftið henda dagin í løgtinginum var gott og sakligt. Og tað var breið undirtøka fyri Nullhugsjónini. Fyri Ferðslutrygd var hetta ein stórur dagur, at landsins kosnu tingmenn loksins høvdu eitt seriøst orðaskifti um ferðslutrygdarviðurskifti. Tosað var um at gera nakað við viðurskiftini og onkur tingmaður spurdi beinleiðis, hví ikki farið verður til verka beinanvegin, í staðin fyri at tosa. Vónirnar vóru stórar fyri, at nú fór løgtingið endiliga at evna til ein umhugsaðan ferðslutrygdarpolitikk, sum kundi savna allar kreftir at røkka einum framtíðarmáli.

Men síðani henda dagin í apríl hevur lítið verið at hoyrt aftur. Ikki fyrr enn nú í vikuni, har tingmaður skjýtur upp at lække avgjaldið á motorsúkklum.

### Framhaldandi álvarsligar ferðsluvanlukkur

Vit hava í dag næstan 25.000 akfør í landinum og vit hava ongantíð ferðast meiri enn tað sama. Og vit hava framhaldandi álvarsligar ferðsluvanlukkur, síðani 1997 eru 27 fólk deyð í ferðsluni, tað er í miðal 3-4 um árið. Harafturat eru fleiri, sum hava fingið varandi mein. Av teimum deyðu er 16 í aldrinum 15-24 ár, ella næstan 60%.

Í álitinum, sum Ferðslutrygd lat úr hondum í fjør, er hópin av tilmælum um, hvussu vit kunnu gera ferðsluna tryggari. Men einki av hesum sigur nakað um at lækka avgjaldið á motorsúkklum. Hinvegin hevur Ferðslutrygd ført fram, at aldursmarkið at fáa koyrikort til motorsúkklur, størri enn 34 hestar, skal vera 21 ár, soleiðis sum tað er í Danmark.

### Lutfalsliga fáar motorsúkklur

Fyri fáum árum síðani vóru einar 100-200 motorsúkklur skrásettar í landinum, men seinastu árini er talið økt munandi, so at tað í dag eru um 500 motorsúkklur skrásettar. Motorsúkklur verða mettar at vera millum vandamestu akfør. Tí er tað ein veruleiki, at jú fleiri ið vera til av teimum, jú fleiri vanlukkur kunnu vit vænta. Tíbetur, kunnu vit siga, hava tað serliga verið tilkomin fólk, sum hava fingið sær motorsúkklur, tey allarflestu sum frítíðarítriv og ikki sum flutningstól.

Verður bíligari at keypa motorsúkklur sum heild, og vit fáa fleiri av teimum, kunnu vit vænta, at ungfólk eisini fara at fáa ráð at keypa hesi vandamiklu flutningstól, og so kunnu vit hvør í sínum lagi rokna restina út sjálvi, sí hagtølini omanfyri.

### Løgin raðfesting

Samanumtikið má sigast, at tað er ein løgin raðfesting, sum tingmaðurin hevur gjørt. Rætt skal vera rætt at tingmaðurin førir fram, at orsøkin til at uppskotið verður sett fram er, at fólk skulu keypa nýggjar motorsúkklur heldur enn gamlar, m.a. tí at nýggjar motorsúkklur eru tryggari enn gamlar. Og tað ljóðar skilagott í sjálvum sær.

Men um vit síggja ferðsluna sum eina heild, og tað haldi eg at vit kunnu krevja av einum tingmanni, so sær út sum, at tað hevur størri týdning at gera broytingar fyri eitt frítíðarítriv hjá einum lutfallsliga lítlan málbólki, heldur enn at gera nakað við teir veruligu trupulleikarnar. Og tú fert at ivast í, um pengapungurin hjá nøkrum fáum hevur størri týdning enn trygdin.

### Jólaheilsan

Mín jólaheilsan til løgtingsmannin og løgtingið, sum heild, skal tí vera: Gevist við at pjøssa upp á ferðslulógina uttan mið og mál. Setið eina ferðslutrygdarætlan út í kortið við Nullhugsjónini sum máli, so allir partar, sum hava við ferðsluna at gera, kunnu savna kreftirnar.

\- - - - - -

Fyri at seta málið í perspektiv verður listin yvir tilmæli frá Ferðslutrygd til landsins myndugleikar settur niðanfyri.

- Ungfólk millum 18 og 25 ár skulu fáa serligt royndarkoyrikort í 2 ár við serligum treytum
- Koyrikort við stigaskipan skal setast í verk
- Útbúgvingin at taka koyrikort til bil skal víðkast
- Skaðanevnd at kanna álvarsligastu ferðsluóhappini verður sett
- Tað skal ikki vera loyvt at nýta summardekk á vetri.
- Tað skal vera lógarkrav at nýta hjálm, tá ið súkklað verður.
- Aldursmarkið at fáa koyrikort til stórar motorsúkklur, størri enn 34 hestar skal vera 21 ár.
- Prutl og skutarar skulu kunna koyra 45 km/t. Fyri at koyra hesi krevst útbúgving við tilhoyrandi undirvísing og staðið prógv.
- Promillumarkið skal lækkast úr 0,5 niður í 0,2
- Loyvt skal verða at súkkla á gongubreytini. Súkklur skulu víkja fyri gongufólki, sum altíð hava fyrstarætt.
- Oyggjar, sum býta koyribreytina í tvey, eiga at verða gjørdar so nógva staðni, tað ber til. Serliga umráðandi er at oyggjar verða gjørdar saman við gonguteigum, so at fólk fáa tikið eina koyribreyt í senn, tá ið tey skulu yvir um vegin.
- Ábyrgdin at halda landsvegir fríðar fyri seyð og annan fenað skal verða løgd á vegmyndugleikan
- Bilverjur skulu verða gjørdar í vandamiklum vegastrekkjum, har tað er trupult ella serliga kostnaðarmikið at gera vegaumhvørvið ferðslutryggari.
- Kantsteinarnir verða lækkaðir við gonguteigar, og har gongubreytir verða avbrotnar av t.d. síðuvegum.

o Skipað skal verða fyri, at náttarbussar koyra millum bygdir, so til ber hjá ungdómi at koma trygt aftur og fram í sambandi við dansi og øðrum náttartiltøkum

o Ásett eigur at verða við lóg, at nøktandi fyrstahjálparútgerð er í øllum bilum, umframt lykt, lítil eldsløkkjari og ein ávaringartríhyrningur, og at hesi viðurskifti verða partur av tí, sum kannað verður, tá ið bilurin verður skoðaður á Bileftirlitinum.

o Fyrstuhjálparskeið skal vera kravdur partur av koyrikortaútbúgvingini

o Venjingarbreyt/hálkubreyt verður gjørd.

o Møguleikarnir hjá fólki at ferðast við bussi eiga at verða øktir.

# Løgin niðurstøða frá Rff til lógaruppskot um avgjald á motorsúkklum

Kári P. Højgaard
*Løgtingsmaður*



Undirritaði hevur innanfyri eina viku fingið tríggjar jólaheilsanir frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Ein mailur kom 9. desember, har takkað verður fyri, at nakrir ferðsluspurningar til kommunuvalið vórðu svaraðir. Somuleiðis kom eitt vakurt jólakort, ið er stemplað 9. desember við tøkk fyri gott samstarv. Til seinast kemur so hendan seinasta jólaheilsanin á Portalinum 10. desember, har tingmaðurin fær eitt spark í dintilin við heilsanini:

***»Gevist við at pjøssa upp á ferðslulógina uttan mið og mál«***

Eg haldi, at greinskrivarin Jón Kragesten, sum dagligur leiðari á Rff, hevur skyldu til at seta seg inn í lógaruppskotið og gera eina sakliga niðurstøðu í málinum; tað er ikki talan um í áðurnevndu grein.

1. Talan er ikki um eitt ferðslulógaruppskot ella broytingar í ferðslulógini.

2. Ídag er ein avgjaldsmunur á nýggjum og gomlum súkklum sum ger, at nærum bert gamlar súkklur verða keyptar. Avgjaldið á gomlum súkklum verður óbroytt, so tað verða bert nýggjar súkklur sum lække í prísi.

Heilt nógvir føroyingar hava fingið sær koyrikort til motorsúkklu, og áhugin fyri at taka hetta koyriprógv er vaksandi. Tí verður gongdin framhaldandi uttan iva tann sama, at innflutningurin av motorsúkklum árliga fer at verða áleið 100 súkklur. Ásannandi hendan veruleika hevur løgtingsmaðurin ta áskoðan, at keypir tú eina fabriksnýggja súkklu, hevur tú trygd fyri at hon er í lagi. Tí eiga vit ikki at hava eina avgjaldskipan, ið viðførir at 90% av innfluttum súkklum eru gamlar.

Neyvan verður avleiðingin av hesum uppskoti, at samlaða talið av innfluttum súkklum økist, men vónandi verður býtislutfallið millum nýggjar og brúktar súkklur endavent.

Kári P. Højgaard tekur fult undir við null-hugsjónini og vil viðvirka, at so fá ferðsluóhapp henda sum yvirhøvur gjørligt. Tó mugu vit fyrihalda okkum til veruleikan, at tey akfør, sum koyra á vegum okkara, eru sýnaði og góðkend til ferðslu, og at tað er førarin, ið skal sýna fyrilit og hava rættan hugburð, tí hann hevur ábyrgdina. Vísandi til gongdina í grannalondum okkara, so er stór minking í MC-ólukkum, hóast talið á motorsúkklum er økt munandi.

Eg eri samdur við Jón Kragesten í, at vit eiga at síggja ferðsluna sum eina heild. Tí eiga uppskot til broytingar í ferðslulógini at koma frá nevndini, ið landsstýrismaðurin hevur sett til hesa uppgávu. Enn einaferð, her er talan um uppskot til broytt skrásetingargjald, ið vónandi gevur nýggjari og harvið tryggari akfør.

# Til Keypmannahavnar at leita eftir trupulleikum

Helgi Abrahamsen



Høgni Hoydal, fólkatingsmaður hevur verið ein túr í Keypmannahavn, og í tí sambandinum nýtti hann høvið at fara inn á Christiansborg at seta forsætismálaráðharranum ein fyrispurning. Endamálið við spurninginum var enn einaferð at fáa lýst danskar myndugleikar sum skurkar, ið ikki virða føroyingar.

Fyrispurningurin var nóg illa svaraður, so var Høgni í fjølmiðlunum, har hann líkasum royndi at "lýsa málið".

Útvarp Føroya segði soleiðis, mikukvøldið 8. desember: "*Hetta er sama søgan umaftur, sigur Høgni Hoydal. Stjórnin leypur føroysku myndugleikarnar um, og setur lógir í gyldi fyri Føroyar, uttan fyrst at spyrja føroyingar.*"

Men hetta var als ikki tað, sum var sagt í svarinum frá forsætismálaráðharranum, og hetta er heldur ikki í samsvari við veruleikan. Anders Fogh Rasmussen svaraði soleiðis: "*Den kundgørelse, som det hedder, der har fundet sted på Færøerne, er sket i overensstemmelse med den gældende ordning og i forståelse med det færøske landsstyre*". Hetta sama hevur løgmaður eisini vátt- að fyri Útvarpinum.

Høgni Hoydal gevur sostatt við vilja skeivar upplýsingar um tað, sum forsætismálaráðharrin segði í svarinum.

Spurningurin til forsætismálaráðharran var ikki settur, tí spyrjarin ynskti at fáa eitt svar, men hann var settur, tí spyrjarin skuldi brúka svarið sum jarnbrot, fyri at sleppa í fjølmiðlarnar við einum boðskapi, sum hann hevði fyrireikað frammanundan. At svarið frá forsætismálaráðharranum als ikki samsvaraði við ætlaða boðskapin, sær út til at hava minni at siga.